# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

## Bilaradio á Rás2 hósdagin kl. 16.05

*Í sendingini er prát við Kemm Poulsen hýruvognsførara og við Heðin Weihe frá Auto Service um nýggja Opel Astra.*




*Í sendingini Bilradio á Rás2 er samrøða við Kemm Poulsen hýruvognsførara*

# Bilar við kraftblokki

**BILAR**
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Í sendingini Bilradio hósdagin kl. 16.05 er prát við Kemm Poulsen í Havn, sum m.a. fortelur um, at hann fyrstu ferð koyrdi bil sum átta ára gamal. Kemm fór í læru sum radiomekanikari á radioverkstaðnum hjá Olivur Næss við Hoydalsvegin í 60-unum. Teir umboðaðu m.a. Blaupunkt bilradio, Storno biltelefonir og Philips plátuspælarar til bilar. Plátuspælararnir vórðu nevndir kraftblokkar, tí hetta var um somu tíð, sum skipini fingu kraftblokkar. Bæði plátuspælararnir og kraftblokkarnir fiskaðu væl á hvør sín hátt.

Hóast Kemm fyrstu ferð koyrdi bil sum átta ára gamal, fekk hann sær ikki koyrikort, fyrr enn hann var 22 ár. Hann hevði tá koyrt bil og hýruvogn í fleiri ár. Tað var ikki fyrr enn hann bleiv steðgaður av politinum sum hýruvognsførari, at hann fekk sær vanligt og áteknað koyrikort. Kemm hevur fleiri áhugaverdar søgur, sum hann á sín skemtiligа hátt sigur frá í sendingini.



*Starvsfelagar uttan fyri radioverkstaðin hjá Olivur Næss við Hoydalsvegin: Bjarni Rubek Nielsen og Kemm Poulsen. Súkklan varð nýtt til at koyra ørindi fyri verkstaðin*



*Kemm Poulsen við sínum Rambler Classic frá 1966 við Philips plátuspælara*



*Ford Taunus 12m sum hoyrdi til verkstaðin hjá Olivur Næss. Myndir er tikin í Jústgøtu*